UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Tórshavn, tann 18. apríl 2023
J. nr.: 23/07982-1
Viðgjørt:
Tygara skriv:

# Reglugerð fyri stuðul til umhvørvisverndartiltøk

**Endamál**
**§ 1** Reglugerðin ásetir treytir fyri stuðulsveiting av konto 18.30.1.01. Stuðul til umhvørvisverndartiltøk.

*Stk. 2.* Endamálið við játtanini er at stuðla verkætlanir, sum:

- eru knýttar at Ramsar-sáttmálanum
- menna vitanina um umhvørvið og náttúru
- virka dálkingarfyribyrgjandi og -avmarkandi
- verja landsløg, djóra- og plantusløg
- kunna almenningin um umhvørvis- og náttúruviðurskifti
- stuðla undir orkusparandi tiltøk

**Stuðulstreytir**
**§ 2**. Stuðul kann veitast kommunum, einstaklingum, feløgum og virkjum.

*Stk.2.* Umhvørvismálaráðið kann krevja upplýsingar um og innlit í arbeiðsgongdina, og hvussu peningurin verður nýttur í verkætlanarskeiðinum.

*Stk. 3.* Stuðulstilsagnir eru galdandi til 31. desembur í stuðulsárinum, sum merkir at stuðul sum ikki er nýttur, fellur burtur. Í heilt serligum førum kann tilsagnarfreistin verða longd við upp til 4 mánaðir eftir árslok.

*Stk. 4.* Frágreiðing um úrslitið av verkætlanini skal latast Umhvørvismálaráðnum, tá verkætlanin er liðug, ella í seinasta lagið 20. februar eftir lokið fíggjarár.

**Serligar verkætlanir**
**§ 3** Tá ið Umhvørvismálaráðið metir tað vera átrokandi, at heilt ávísar verkætlanir verða framdar, kann aðalráðið seta í verk hesar verkætlanir við fígging av játtanini til umhvørvisverndartiltøk.

Gongin 7 • FO-100 Tórshavn
Tel. (+298) 35 87 00 • umhvorvi@umhvorvi.fo • www.umhvorvi.fo

*Stk. 2.* Tá ið Umhvørvismálaráðið setur í verk verkætlanir, kann tað gerast við almennari lýsing í fjølmiðlunum, ella við beinleiðis samskifti við serfrøðingar.

**Umsókn**

**§ 4** Fyri 2023 skulu umsóknir um stuðul vera Umhvørvismálaráðnum í hendi til lýstu freist, annars í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári. Lýst verður á heimasíðuni hjá Umhvørvismálaráðnum www.umhvorvi.fo.

*Stk. 2.* Verður øll játtanin ikki nýtt í fyrsta umfari, verður lýst eftir fleiri umsóknum við nýggjari umsóknarfreist.

*Stk. 3.* Umsóknir skulu skrivast á **oyðublaðið** "Umsóknarblað til stuðul av játtanini til umhvørvisverndartiltøk", sum er tøkt á heimasíðu ráðsins. Aðrar viðkomandi upplýsingar fyri umsóknina og verkætlanina kunnu leggjast við sum fylgiskjøl til umsóknarblaðið.

**Útgjald**

**§ 5.** Stuðulin verður útgoldin tá Umhvørvismálaráðið hevur móttikið verkætlanarroknskap.

*Stk. 2.* Verkætlanarroknskapurin skal lúka treytirnar í §§ 21-22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

**Gildiskoma**

**§ 6** Henda reglugerð kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer úr gildi reglugerð fyri umhvørvisverndartiltøk frá 26. februar 2021.

Umhvørvismálaráðið, 18. apríl 2023

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna

/Pól Egholm
aðalstjóri